# Eftirmeting av evnisdegi um Førleikastovur,

## sum varð hildin á Hotel Føroyum 18. februar 2013

Á fundi í Fólkaskúlaráðnum 14. januar 2013 var avgerð tikin um at skipa fyri eini eftirmeting av Førleikastovunum. Hetta var gjørt í samráð við mentamálaráðharran (fundarfrásøgn 14. januar 2013).

Innbjóðingar blivu sendar til leiðsur, serlærarar, lesivegleiðarar, AKT-lærarar, Sernám og onnur áhugað. Undirtøkan var sera góð, umleið 100 fólk møttu til tiltakið, har skráin var hendan:

1. Skipan, fortreytirnar við atliti at skúlastødd, tímum og fakligum førleikum – Jenny Lydersen
2. Endamál og arbeiðsøki sambært uppritinum hjá Fólkaskúlaráðnum – Karolina Matras
3. Førleikastovan sum ráðgevi hjá leiðsluni – Andrass Henriksen
4. Førleikastovan í verki, leikluturin hjá starvsfólkabólkunum – Jónleif Johannesen
5. Skipan við smærri skúlum – Charlotta Thorsteinsson og Anna Maria á Lakjuni
6. Framløga av Spurnarkanning um Førleikastovur – Tonnie Strøm og Marjun Ziskason
7. Eftirmeting og tilráðingar, skipað sum bólkaarbeiði og framløga í plenum – Tonnie Strøm og Marjun Ziskason

Luttakararnir vórðu býttir í 6 bólkar:

| | |
|---|---|
| Bólkur 1: | Leiðslur við skúlar 1 – 80 næmingar |
| Bólkur 2: | Leiðslur við skúlar við fleiri enn 81 næmingum |
| Bólkur 3: | Serlærarar |
| Bólkur 4: | Lesivegleiðarar |
| Bólkur 5: | AKT-lærarar |
| Bólkur 6: | Sernám og onnur |

Uppgávan hjá bólkunum var at koma við ítøkiligum uppskotum til ábøtur av Førleikastovuni

## Framløgurnar hjá bólkunum

Hetta eru tær ábøtur, sum komu fram í bólkaarbeiðinum.

## Bólkur 1: Skúlaleiðarar á skúlum 0 – 81 næmingar

Hvørjar ítøkiligar ábøtur eiga at gerast?

- Mangla skeið til AKT- og SSP lærarar.
- Mangla ráðgevarar í støddfrøði.
- Smáu skúlarnir fáa lutfalslilga ov lítið – tí vitanin má koma uttanífrá.
- Tíð til koyring – t.v.s. koyripening, so tíðin ikki verður tikin av næmingatíðini.
- Fáa fólk frá førleikastovunum út á skúlarnar at greiða frá stovuni og funktiónunum.
- Meiri kunning ... frá MMR.
- Fáa greiðu á, hvør skúlaleiðari hevur ábyrgdina, tá førleikastovan spennir yvir fleiri skúlar.
- At skúlaleiðarin kann avgera, hvør er formaður/leiðari í Førleikastovuni.

## Bólkur 2: Skúlaleiðarar á skúlum størri enn 81 næmingum

Hvørjar ítøkiligar ábøtur eiga at gerast?

- Ynskja meira formligar mannagongdir, tá ið søkjast skal um tímar frá Sernámi.
- Skúlaleiðarar ynskja betri grundgevingar fyri játtandi og noktandi svari um tímar
- Gera tað smidligari at flyta vitan millum stovn/skúla/heilsufrøðing/miðnám (flytingarblað)
- Pappír hjá næmingunum eigur at flyta við, tá ið næmingar flyta skúla
- Fáa felags reglur um lesikanningarnar verða rættaðar á Sernám ella í Førleikastovuni
- Kveikingarskeið til limirnar í Førleikastovuni, t.d. 2 dagar
- Hava ein vitanargrunn (t.d. ráðstevnu á FC) fyri Førleikastovuna
- Limirnir í Førleikastovuni arbeiða á øðrum skúla t.d. eina viku.

## Bólkur 3: Serlærarar

Hvørjar ítøkiligar ábøtur eiga at gerast?

- Tíð – fleiri tímar skulu til. Alt skal byggjast upp; mannagongdir, ráðgeving, stuðul hjá lærarum, kanningar, eftirmeting o.s.fr.
- Kunngerð skal skrivast, so ein veit, hvat uppgávurnar eru. Arbeiðssetningurin skal samsvara við tímajáttanina.
- Allýsa leiklutin hjá heilsufrøðinginum. Gott, at hesin er á staðnum og kann koma við á fund ella at vera at heita á.
- Allýsa leiklutin hjá serlæraranum á Førleikastovuni
- Fáa greiðu á, hvussu økini verða skipað, og hvørjir skúlar koma undir somu stovu í sambandi við at veita smærri skúlunum ráðgeving.
- Arbeiðsøki, ferðing og samsýning

- Tímaintervallini skulu minkast
- Serlærari kann gera lesikanningar fyri skúlaaldur

## Bólkur 4: Lesivegleiðarar

Hvørjar ítøkiligar ábøtur eiga at gerast?

- Miðfirraðir tímar og tímar vegna serligan tørv eiga at verða lagdir til Førleikastovuna at umsita
- Best um leiðslan, lesivegleiðarin og føroysktlærarin samráðast um tilmælta tíman í fyrsta flokki
- So fá sum møguligt hava serundirvísing
- Neyðugt at hava fleksibult skema fyri at røkja lesivegleiðarauppgávuna
- Allir bólkar í Førleikastovuni hava partvís tíð í senn til sítt arbeiði
- Ov lítil tíð til arbeiði sum lesivegleiðari
- Krevja servitan, tørvur er á førleikaviðbót
- Greitt arbeiðsbýti millum Sernám og Førleikastovuna. Sum nú er, er ofta dupult arbeiði, við tað at skúlin og Førleikastovan hava gjørt eygleiðingar, áðrenn tey venda sær til Sernám
- Allýsa leiklutin hjá lesivegleiðarunum á Førleikastovuni
- Týdningarmikið, at vit hava gott kanningar- og eftirmetingartilfar sum grundarlag undir næmingalagaðari undirvísing
- Úrslit av lesi- og landsroyndum skulu vera tøk á Førleikastovuni fyri at fylgja arbeiðinum upp

## Bólkur 5: AKT-lærarar

Hvørjar ítøkiligar ábøtur eiga at gerast?

- Fundartíðin eigur ikki at fara burtur av tíðini hjá AKT-lærarانum.
- Samstarvið millum flokslæraran og AKT-læraran má verða tætt og greitt
- Útbúgving til AKT-læraran
- Møguleika at samlast tvær ferðir um árið, soleiðis, at vit kunnu læra av hvørjum øðrum, t.d. fingu fyribirgingaruppskot frá hvørjum øðrum
- Førleikastovan átti at fingið ein skemafrían fundardag um mánaðan
- Fáa tilfar við íblástri frá hinum Norðanlondunum
- Sleppa at taka partar av viðkomandi undirvísing á Setrinum
- AKT-lærarar, sum røkja uppgávur á smærri skúlum samla tímarnar upp og taka síðani ein heilan dag nakrar ferðir um árið. Tíðin til at ferðast eigur at koma umframt
- MMR má geva AKT-tímar, sum ikki eru útloystir til skúlan til trivnaðarátøk, sum AKT-felagið samskipar.

- Førleikastovan má hava førleikan, men tað er ikki neyðugt at halda fast í serlærara, lesivegleiðara og AKT-lærara. Aðrir førleikar eiga eisini, har hinir førleikarnar ikki finnast, at sleppa framat.
- Skrásett samskifti millum Sernám og Førleikastovuna

## Bólkur 6: Sernám og onnur

Hvørjar ítøkiligar ábøtur eiga at gerast?

- Fáa skipanina at virka, má ikki bindast uppá persónar, men skipast eftir funktiónini.
- Greitt uppgávubýti millum lærara, førleikastovuna og Sernám.
- Uppgávur og resoursir fylgjast at.
- Skipa virksemi hjá førleikastovuni soleiðis, at tað eru fastlagt fundarvirksemi, umframt, at lærarar og onnur vita nær til ber at fáa samband við Førleikastovurnar. Hetta er sera hent í mun til skipa virksemi við eitt nú Sernám. Her má tó eisini vera tímar, sum eru fleksiblir.
- Kunning til lærararnar um, hvat arbeiðið er hjá Førleikastovuni og hvat og hvussu Førleikastovan kann og skal brúkast.

## Mentamálaráðið arbeiðir víðari við hesum málum:

- Lýsa leiklutirnar hjá manningini á Førleikastovuni.
- Gera kunngerðir fyri hvønn fakbólk, sum skulu vera lýstar og klárar til skúlaárið 2013/14.
- Jenny, Frida og Emmy gera uppskot til ein samstarvsleist millum Førleikastovuna og Sernám.
- Fáa tímajáttanina út til skúlarnar í góðari tíð, so Førleikastovan kann raðfestast í skemaleggingini.
- Fáa Førleikastovuna at virka á smáu skúlunum, tá talan er um manning, tíð og ferðing.
- Saman við Føroya Lærarafelag at finna skipan fyri ferðaendurgjald og flutningstíð.